VINNUMÁLARÁÐIÐ

# Stjóri til Strandfaraskip Landsins

**Søkt verður við hesum eftir einum víðskygdum stjóra til Strandfaraskip Landsins at seta 1. februar 2009 ella skjótast til ber eftir hetta.**

**Starvsøkið**
Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka og virkar sum rakstrar- og ráðleggingareind fyri almennu flutningstænastuna á sjógvi og á landi. Ræði og røkt av skipum og aktivum liggur hjá Strandfaraskipum Landsins.

Landsfyritøkan umsitur skyldu landsins at skipa fyri nøktandi sjóvegis fólka-, og farmaflutningi og landvegis fólkaflutningi. Busskoyringin er útveitt til privatar busseigarar at røkja. Samlaða ferðafólkatalið sum stovnurin flytur er um 1,2 mió. árliga. Harumframt umsitur Strandferðslan tyrluflúgvingina millum oyggjarnar.

Strandferðslan veitir árliga tænastur fyri góðar 170 mió. kr., harav 120 mió kr. verða játtaðar á fíggjarløgtingslógini, meðan 50 mió. kr. eru inntøkur frá ferðaseðla- og farmagjøldum. Tænastur stovnsins eru týðandi táttur í at binda landið saman, og tað liggur á Strandferðsluni at samskipa ymisku leiðirnar á besta hátt eftir tørvinum á staðnum og annars hjá øðrum ferðandi.

Uml. 170 fólk við rættiliga ymiskum útbúgvingum og førleikum starvast í dag víða um landið at røkja henda flutning, og ein stórur partur av teimum arbeiðir í skifti. Høvuðsskrivstovan og fyrisitingin av stovninum liggur á Tvøroyri.

**Starvið**
Sum ovasti leiðari á landsfyritøkuni ført tú ábyrgdina av at tryggja ein stabilan, effektivan og tryggan rakstur av flutningsuppgávuni hjá landsfyritøkuni. Tú skalt tryggja eina skilagóða fíggjarstýring, og at starvsfólkahópurin trívist og hevur røttu førleikarnar til uppgávurnar. Avbjóðingin hjá nýggja leiðaranum er framhaldandi at menna landsfyritøkuna og ta tænastu hon veitir kundunum.

Tað verður eisini tín uppgáva at síggja nýggjar møguleikar í virkseminum, og at menna hesar møguleikar til nýggj tilboð, til gagns fyri kundarnar og fyritøkuna.

**Umsóknir**
Heldur tú tað vera eina spennandi avbjóðing at standa á odda fyri hesari landsfyritøku, og kanst tú vísa á, at tú hevur hesar fortreytirnar:

- viðkomandi ástøðilig/ar útbúgving/ar og leiðsluroyndir frá privata ella almenna arbeiðsmarknaðinum,
- sýnd góð samstarvsevni og áhuga fyri leiðslu og starvsfólkamenning,
- og at tú ert framtakshugaður og innovativur,

**Setanartreytir og annað**
Starvið er lønt í 38. lønarflokki eftir sáttmálanum millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið. Setanartreytir annars verða ásettar í sersáttmála við Vinnumálaráðið.

Umsóknin skal verða Vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 30. desember 2008.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Vinnumálaráðið, Arne Poulsen, aðalstjóra.

**Vinnumálaráðið**
Tinganes
Postrúm 377
110 Tórshavn

STARV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingar til kardiologiska ambulatorium G3

Á kardiologisku starvstovuni eru tvey avloysarastørv á starvsbrøki 0,5 leys at søkja til setan 1. februar 2009 ella eftir avalu til og við 31. august 2009.

**Arbeiðsøkið í høvuðsheitum**
- at hjálpa til við diagnostiskum virksemi innan A-EKG, Ekko, Holter og pacemakarum
- røkt og ráðgeving til hjartasjúklingar
- arbeitt verður í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar
- um ongin hjartalækni er, kann ein partur av uppgávunum verða á B8

**Førleikakrøv**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- faklig vitan og royndir við at viðgerða og røkta hjartasjúklingar
- góð tværfaklig samstarvsevni
- teldukunnleika
- fleksibul og positiv

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- samskipaða innleiðslu
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- fakliga menning

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**
- kardiologiskar royndir
- kardiologiska eftirútbúgving

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at ringja 304500 til Unnur á Dunga, deildarleiðara, lokal 6250, lsunndu@ls.fo ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasap@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 5. januar 2009 kl. 12.00**

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum
(sí meira á www.lsh.fo)

**Fysioterapeutur**
Umsóknarfreistin er 15. desember 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til Skurðgongina**
Umsóknarfreistin er 19. desember 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til Skopieindina á Skurðgongini**
Umsóknarfreistin er 19. desember 2008 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn



**Á Landssjúkrahúsinum**
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

## NÓLSOY

Veitsla fyri útisetar tann 07.02.2009 verður í B36-húsinum, sum hava gingið barnaárini í Nólsoyarskúla. Skundi tykkum at tekna tykkum og makan , pláss er bert fyri 220 fólkum. Freistin er 07.01.2009. Aldursmark 25 ár. Tilmelding fer fram við at gjalda 375,00 kr. Fyri hvønn persón, á konto í Eik 9181-1696582. Eru spurningar eru tit vælkomin at ringja til Gudni 516550, Tóra 511054, Mariann 585881 ella Óluva 231440.



**West Highland White Terrier hvølpar til sølu**

Hava DKK stamtalvu.
Bæði foreldur eru premieraði við 1. plássum á FCI framsýning.

**Tlf. 22 30 21**

Lesið Sosialin - so eru tit við



Lesið Sosialin - so eru tit við